# Málið er ikki avgerandi




*Føroysku leikararnir vóru sjálvsagt í øðini, at dómarin loyvdi hondbóltsspælinum hjá Jovanovic*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**A-LANDSLIÐIÐ** Nemanja Vidic slær fast, at fyrsta málið hjá Serbia legði grundarlagið undir sigurin. Men gestirnir høvdu eisini vunnið, um málið ikki var viðurkent

Uni Holm Johannesen

Serbia hevði vunnið við trimum málum, hóast dómarin hevði floytað fyri frísparki, áðrenn Danko Lazovic legði gestirnar á odda.

Annað er ikki hugsandi.

Í øllum førum ikki sambært Nemanja Vidic, verjuspælara úr Manchester United.

Hann er sannførdur um, at tað er eingin grundgeving fyri tapið hjá føroyingum.

– Vit høvdu fingið mál fyrr ella seinni. Eysturríki og Rumenia hava spælt truplar dystir í Føroyum seinasta árið, og vit tóku uppgávuna í álvara. Vit hava spælt betri dystir enn hendan, men vit vunnu uppiborið. Vit greiddu uppgávuna og hugsa nú um komandi dystin, sigur Nemanja Vidic.

Men var tað rætt, at málið hjá Lazovic varð viðurkent?

– Nei. Eg sá, at Jovanovic nýtti hondina. Dómarin sá tað ikki, og vit fingu málið. Tað er ikki meira at siga um tað, sigur Nemanja Vidic.

*uni@sosialurin.fo*

# Fáar broytingar

Brian Kerr fekk sín elddóp sum føroyskur landsliðsvenjari hin 10. juni í fjør. Tá vitjaði Serbia eisini á Tórsvølli.

Tað eru fáar broytingar farnar fram í føroyska landsliðshópinum síðan. Tað sæst, at landsliðsvenjarin hevur ikki framt nógvar broytingar í byrjunaruppstillingini, men útskiftararnir hava fingið fleiri nýggj andlit.

Jákup Mikkelsen, Jónas Tór Næs, Egil á Bø, Atli Gregersen, Johan Troest Davidsen, Bogi Løkin, Atli Danielsen, Súni Olsen, Fróði Benjaminsen, Símin Samuelsen og Christian Lamhauge Holst mannaðu føroyska liðið hin 10. juni í fjør.

Jann Ingi Petersen, Christian Høgni Jacobsen og Andrew av Fløtum vóru innskiftir í seinna hálvleiki. Meinhardt Joensen, Bartal Eliasen, Einar T. Hansen og Hjalgrím Elttør sótu á beinkinum.

*uni@sosialurin.fo*



*Brian Kerr, landsliðsvenjari, í miðjuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kerr er vónbrotin

**A-LANDSLIÐIÐ** Landsliðsvenjarin er sjálvsagt vónbrotin um fyrsta málið hjá Serbia

Uni Holm Johannesen.

Landsliðsvenjarin er týðiliga vónbrotin.

– Eg standi við venjaraskýlið, sum er heilar 60 metrar burtur frá málinum. Eg síggi væl, at Milan Jovanovic tekur hondina til hjálpar. Dómarin og linjuverjin standa fáar metrar burtur og síggja einki. Eg skilji tað ikki, sigur Brian Kerr.

Føroyingarnir vóru í øðini um málið. Milan Jovanovic varð rendur um koll í brotsteiginum, tá framherjin legði bóltin til rættis fyri Danko Lazovic, sum sendi bóltin í netið handan Gunnar Nielsen.

– Málið fær stóra ávirkan á dystin. Vit eru rasandi og vónsviknir, sum hevur við sær, at vit eru ikki til reiðar, tá serbarnir økja um leiðsluna beinanvegin, sigur Brian Kerr.

Men er tað ein haldbar grundgeving fyri uppiborna tapið?

– Tað skal eg ikki siga. Men málið vendir dystargongdini fullkomiliga. Serbarnir fáa eitt mál, sum teir ikki hava uppiborið. Tað er ikki nøktandi, sigur Brian Kerr.



*Ólógliga leiðslumálið hjá serbum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Nøgdur hóast alt

Tað er eingin ivi um, at Serbia vann greitt og uppiborið 3-0.

Gestirnir settu leikferðina niður, tá fyrra umfarið var hálvrunnið. Føroyar trýstu eina løtu í seinna hálvleiki, og tað var um reppið, at føroyingarnir stýrdu vandamiklu innleggunum í málið.

Símun Samuelsen kendi seg eisini snýttan, tá dómarin ikki floytaði fyri brotssparki í seinna hálvleiki. Vágbingurin varð skumpaður í ryggin, men dómarin lat ikki við seg koma.

Brian Kerr er nøgdur við føroyska avrikið.

– Vit hava framvegis fleiri ungar leikarar á liðnum. Gunnar Nielsen, Jónas Tór Næs, Atli Gregersen, Jann Ingi Petersen, Jóan Símun Edmundsson og Hendrik Rubeksen eru ikki drúgvir í landsliðshøpi. Teir taka seg støðugt fram sum landsliðsleikarar, og tað er eingin orsøk at stúra fyri komandi uppgávunum. Vit verða betri og betri, metir Brian Kerr, landsliðsvenjari.

Hann harmast um, at áskoðararnir ikki kundu fegnast um eitt føroyskt mál.

– Áskoðararnir stuðlaðu okkum væl og høvdu uppiborið at fingið eitt føroyskt mál, sigur landsliðsvenjarin.

*uni@sosialurin.fo*

### **Føroyar – Serbia** 0-3 (0-2)

**0-1: Danko Lazovic, 14.**
**0-2: Dejan Stankovic, 18.**
**0-3: Nikola Zigic, 90.**
Dómari: Albert Toussaint, Luksemborg
1800 áskoðarar

**Føroyar:** Gunnar Nielsen, Tranmere Rovers – Jón Tór Næs, B36, Atli Gregersen, Ross County, Jóhan Troest Davidsen, NSÍ, Hendrik Rubeksen, HB – Christian Lamhauge Holst, Silkeborg IF (Arnbjørn Hansen, EB/Streymur, 79.) – Jann Ingi Petersen, NSÍ, 73.), Fróði Benjaminsen, HB, Daniel Udsen, EB/Streymur, (Christian R. Mouritsen, B36, 46.), Símun Samuelsen, HB – Jóan Símun Edmundsson, Newcastle United
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Tórður Thomsen, HB, Egil á Bø, EB/Streymur, Einar T. Hansen, NSÍ, og Bogi Løkin, NSÍ.
Gult kort: Eingin
Venjari: Brian Kerr
**Serbia:** Andjelko Djuricic, UD Leiria – Antonio Rukavina, TSV 1860 Munchen, Nemanja Vidic, Manchester United, Danko Lazovic, FC Zenit St. Petersburg (Milos Ninkovic, FC Dynamo Kiev, 83.), Dejan Stankovic, Inter Milan (Radosav Petrovic, FK Partizan, 58.), Milan Jovanovic, Liverpool, Ivan Obradovic, Real Zaragoza, (Aleksandar Lukovic, FC Zenit St. Petersburg, 46.), Milos Krasic, Nikola Zigic, Birmingham City, Neven Subotiv, BV Borussia Dortmund, Zdravko Kuzmanovic, VfB Stuttgart
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Zeliko Brkic, FK Vojvodina, Pavle Ninkov, Zoran Tosic, CSKA Moskva, Dragan Mrdia, FC Sion
Gult kort: Ivan Obradovic, 32., Antonio Rukavina, 86.
Venjari: Resad Kunovac